# Bogi Gregersen til B68

28 ára gamli Bogi Gregersen hevur spælt fyri Skála, men nú liðið er flutt úr bestu deildini, skifti Bogi til B68 at spæla. Vlada Filipovic hevur spælt við B68 og heldur fram sum málverji í felagnum. B68 sigur, at nnars eru flest allir hinir spælarnir komnir uppá pláss. Útlendingarnir Ndende og Keita verða aftur at síggja á Toftum næsta ár, meðan Badara og Landing ikki fáa sínar avtalur longdar. Ivasamt er eisini, hvussu tað verður við danska framherjanum Brian Andresen.




# Avlýst hjá føroyingafeløgum

Nógvur kavi liggur í Danmark, og rakar tað eisini donsku fótbóltskappingarnar. Felagið hjá Toda Jónssyni, FC Amager skuldi eftir ætlan taka ímóti liðnum hjá Christiani Lamhauge Holst, Silkeborg. Men tann dysturin varð avlýstur. Tað sama var galdandi fyri liðið hjá Christiani Høgna Jacobsen, AB. Tað var heldur ikki spælandi í Gladsaxe, har AB eftir skránni skuldi taka ímóti Skive. Dysturin millum FC Fredericia-Lolland Falster Alliancen, og dysturin millum FC Roskilde-Kolding FC vórðu eisini avlýstir. Umfarið um vikuskiftiðn var hitt seinasta, áðrenn danska kappingin fer í vetrarsteðg.



*Fríði Dam úr Sunda Judofelag, sum vann bronsu í bólkinum -60 kg. og Jónas Johannesen, eisini úr Sunda Judofelag, sum vann silvur í bólkinum -50 kg. hjá ungdómi 14-17 ár*

# Vunnu tvey heiðurs-merki í Danmark

**10 føroyskir judoleikarar í aldrinum 13 til 19 ár vóru um vikuskiftið til Hillerød Cup, sum er ein stór altjóða judokapping í Danmark**

JUDO
*Tíðindaskriv*

Tilsamans vóru útvið 400 luttakarar úr Danmark, Føroyum, Noreg, Svøríki, Týsklandi og Póllandi við í kappingini.

Føroysku luttakararnir kláraðu seg sera væl, og úrtøkan var 6 heiðursmerkir.

Hjá unglingunum vann Bjørn Andreasen úr Sunda Judofelag gull í -81 kg. bólkinum, meðan Nicolaj Mohr Vang úr Havnar Judofelag vann bronsu í sama bólki. Búygvi Hansen úr Sunda Judofelag vann gull í bólkinum -66 kg., eins og Andrias Sumberg úr Sunda Judofelag vann silvur í bólkinum -73 kg.

Hjá yngru ungdómunum vann Jónas Johannesen úr Sunda Judofelag silvur í bólkinum -50 kg., meðan Fríði Dam, eisini úr Sunda Judofelag, vann bronsu í bólkinum -60 kg.

Hinir yngru luttakararnir kláraðu seg eisini væl, hóast teir ikki vunnu heiðursmerkir.

Aksel D. Remmel úr Havnar Judofelag vann sín fyrsta dyst sannførandi, men tá hann taptir teir báðar næstu, so rakk tað ikki til heiðursmerkir. Pærur Jákupsson, Páll Magnus úr Baianstovu Dam og Tróndur Petersen úr Havnar Judofelag taptu sínar dystir, men hetta vóru allir góðir dystir, sum í fleiri førum vóru javnir, har okkara luttakarar høvdu sínar møguleikar, men samanlagt gjørdust ov stuttir.

Alt í alt ein kapping sum vísti, at vit hava góðar judoleikarar, sum nokk skulu roynast væl á eldri landsliðum, tá teirra tíð kemur!

# Borðtennis grand-prix

Um vikuskiftið vóru umleið 60 borðtennisleikarar savnaðir í ítróttarhøllini í Eysturskúlanum í Havn, har 3. Grand Prix umfar í borðtennis varð avgreitt. Vinnarin av A-bólkinum hesaferð gjørdist Rói Agnarsson. Hann hevur verið við í tveimum Grand Prix kappingum í ár, og hevur hann vunnið tær báðar uttan at tapa ein dyst – 11 sigrar og einki tap.

**Bólkavinnararnir:**

A: Rói Agnarsson, TÓR
B: Sjúrður Ferjá, TBF
C: Tóki Thorsteinsson, TÓR
D: Magnus Johansen, KÍ
E: Knútur Jóanesarson, TÓR
F: Vár Holm, TBF
G: Herman Winther, TÓR

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 195 | 160 | 35 | 12 |
| 2 Stjørnan | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 188 | 143 | 45 | 11 |
| 3 Tjaldur | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 184 | 156 | 28 | 9 |
| 4 Neistin | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 177 | 158 | 19 | 8 |
| 5 StÍF | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 159 | 213 | -54 | 2 |
| 6 Kyndil | 7 | 0 | - | 0 | - | 7 | 124 | 197 | -73 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 161 | 146 | 15 | 10 |
| 2 H71 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 159 | 140 | 19 | 8 |
| 3 Neistin | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 182 | 171 | 11 | 8 |
| 4 StÍF | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 146 | 141 | 5 | 7 |
| 5 KÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 136 | 158 | -22 | 2 |
| 6 Kyndil | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 139 | 167 | -28 | 1 |